TILTØK

1. sunnudagur e. páskir
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein. Talvan gongur fyri Bláakross í Føroyum
Vesturkirkjan: kl. 11, Sverri Steinhólm
Norðskála: kl. 11, Bergur D. Joensen
Bøur: kl. 11, David Johannesen
Broytt kirkjutíð: Komandi sunnudag 18. apríl, verður farið í kirkju kl. 11 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø
Gøta: kl. 11, konfirmatión Martin Restorff Jacobsen. Frá sunnudagnum komandi verður aftur farið í krikju í Gøtu kl. 11
Hov: kl. 12, altarg.,
Suðuroyar Ellis- og Røktarheim: kl. 15, altarg.,
Suðuroyar Sjúkrahús: kl. 16, altarg., Patrick de Neergaard
Hvalvík: kl. 12, Mogens T. Christensen
Hvannasund: kl. 12, konfirmatión, Elsa Funding
Eiði: kl. 11, konfirmatión Emil Olsen
Selatrað: kl. 11 lestur.
Kirkjutíðin flutt til kl. 11 fyri summarið
Leirvík: kl. 12, Uni Næs
Broytt kirkjutíð: Frá komandi sunnudagi verður farið í kirkju kl. 11 í Fuglafirði og á Hellunum
Porkeri: kl. 12, Bjarni Bæk
Dalur: kl. 12, Jákup R. Hansen

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin 19. apríl kl. 19.30. Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari verður við.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Av tí at Argjalegan er í Leguhúsinum í Hesvík, verður sunnudagsskúlin og Junior verður í Leguhúsinum. Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Mourits Mouritsen.

Sjómanskvinnuringurin á Argjum
kemur saman mánakvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 verður Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti har Jákup Eli Østerø úr Klaksvík talar. Kl. 21 verður Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak, sum er ætlað ungdómi (5.-10. flokk).
www.hebron.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, evnið í ABC »Dópurin í Heilaga Andanum« 1. partur v/ Jacobinu Jacobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 19.30 Breakthrough worship og bønarskúlin. www.filadelfia.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóna Johannesen. Evnið: Mildleiki, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Lars Messerscmidt í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Samkoman Rhema
Leygarkvøldið frá kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli, Poli Jacobsen talar. Á møtinum verður biðið fyri sjúkum. www.rhema.fo

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Bjarni Jøkladal um evnið: »Orð Jesusar á krossinum« (3) og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Johnny í Grótinum um evnið: »Nehemisa: maður við góðum fólki«.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. www.livdin.fo

á Fløtum Landavegur 88
Bíbliugransking við Pætur M. Hansen verður mánakvøldið kl. 20, evnið Galatiabrævið.
Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Sunnudagin kl. 11 Møti. Sunnudagsskúli kl. 14. Bøn kl. 17.30, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 17 Smáskótar og kl. 19 stórir skótar.
Ellisheimið kl. 19.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti v/ Elsu Jacobsen, kristniboðara.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Meinigheitsfundur v/ Alfred Petersen, kór syngja.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ Gardar Ragnarson. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 19. kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Karen Breiner. Evnið: At vera trúboðarabarn í India.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti v/ Eiler Johannesen, luttøka úr Vík og av Skála. Tórmund Hansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin í Saron.
Mánakvøldið kl. 20 Opið hús fyri ung.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Johan Myllhamar.
Týsdagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Vinjard og AnnMari. Sunnudagin kl. 17 Møti v/ Osbjørn Joensen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Lívsins Orð, Saltangará
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17 Møti v/ Theodor Petersen o.fl.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti v/ breyðbróting.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagsskúli verður sunnudagin á Kambsdali og í Thabor kl. 13.30 og kl. 18 verður møti við teimum ungu.

Siloa, Fuglafjørður
Á fundinum sunnukvøldið kl. 18 er vitjan úr Hebron á Argjum. Páll Poulsen talar og trio syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tabor á Toftum
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Alfred Olsen hevur bíbliutíma um Dánjal. Bønarløta ein hálvan tíma áðrenn.

Leirvíkar missiónshús
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Jónhilda og Gullakk syngja. Aftaná venur húsakórið. Øll eru vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

KFUM og K, Klaksvík
Leygarkvøldið kl. 19 Sangløta í kirkjuni við kórum í KFUM frá 60-unum til í dag.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Niels Jaocb Nielsen, Streingjakórið syngur. Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18. Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Curt Christensen, kl. 18 Evangel. møti við Curt Christensen. Vælkomin í Betania.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum **í Porkeri** leygarkvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Ragnar Ludvig. Evnið verður: Dópur. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti v/ Toril og Niels Edvard Olsen.
Týskvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Missiónshúsið í Hovi
Dýra biðidagsvikuskiftið 7.-9. mai verður bíbliuskeið. Nærri lýst seinni.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbygg. fundur.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Eyfinn Mørk og Árna Kjærbæk. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Betania, Sumba
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyahúsið – DK
Sunnudagin 18. apríl kl. 17 skipar Kristnastova fyri evangel. møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn. Poul Jóhan og Elsa Djurhuus luttaka. Eisini verður felagssangur og sangframførsla við sangkreftum úr Kristnastovu. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Evangel. fundir í DK
Fríggjakvøldið 16. apríl kl. 19.30 verður evangel. fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19 í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17 í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Talarar Levi Joensen og Óli Nattestad. Øll eru hjartaliga vælkomin.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 17. apríl, Fuglafjørður tlf. 44 40 38
Sunnudagin 18. apríl, Skála tlf. 44 14 90

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setir lív sítt til fyri seyðirnar.
Jóh 10,11

Sagt verður um nøkur børn í New Zealandi, at tey ein dagin vóru vilst úti í einum skógi.

Tey ganga og ganga, men finna als ikki burturúr skóginum aftur. Sum tey ganga, hoyra tey røddir, ið rópa á tey, men skilja ikki, at tað eru vinir, sum eru komnir at leita eftir teimum og bjarga teimum. Børnini renna í staðin fyri undan longur og longur inn í skógin og detta at endanum um av maktarloysi. Ikki fyrr enn tá verða tey funnin og borin heim.

– Á, sum tey vóru býtt at renna undan teirra bjarging, kunnu vit siga, men spurningurin er um vit menniskju ikki mangan líkjast hesum børnum. Jesus leitar eftir okkum og kallar á okkum við síni mildu rødd fyri at bjarga okkum; men mong menniskju vilja ikki vita av honum og bjarging hansara.

Líknilsið um Jesus sum hirðin, ið leitar eftir hinum eina vilsta seyðinum, hevur verið og er mongum menniskjum sera kært. Tað sæst eisini av teimum óteljandi lýsingunum, ið eru gjørdar av hesum í málningum og tekningum. Flestu heim í Føroyum hava á ein ella annan hátt eina mynd hangandi av hesum, kanska serliga inni í barnakømrunum.

Í líknilsinum um seyðamannin fáa vit eyga á Jesu umsorgan fyri hvørjum einstakum av okkum. Hann letur ikki tann eina seyðin fara fyri skeytið, nei, hann ger alt fyri at bjarga honum. Hann hugsar ikki um egnan vinning, at nú hevur hann 99, og bara ein manglar, so tað ikki ger ikki so stóran mun. Nei, í ovurstórari umsorgan fyri tí eina, fer hann at leita eftir tí burturmista. Eins og seyðirnir í Ísrael, eru vit menniskju altíð í vanda. Tann óndi gongur um sum ýlandi leyva eftir okkum. Men í hesum vanda er tað okkara troyst, at vit hava ein hirða, ið leitar eftir okkum. Hann leitar ikki eftir okkum fyri at revsa okkum; men harafturímóti fyri at bera okkum trygt á herðum sínum heim til sín.

Henda leiting fer fram við, at hann letur orð sítt verða boðað um, at vit bara skulu taka ímóti gávuni, syndanna fyrigeving, ið Jesus hevur vunnið okkum, og venda um til Guds.

Fyri Jesus er hvør einstakur syndari dýrt keyptur. Hann hevur við lívi sínum og deyða sínum leyst okkum allar syndarar. Hann er ikki líkasælur viðvíkjandi tær og mær, men ynskir at finna okkum og bera okkum heim á herðum sínum.

Tá ið hann hevur funnið tann eina, er hann so ovurglaður, at hann kallar vinir og grannar at samgleðast við sær um tann eina syndaran, sum vendi um.

At verða funnin av hirðanum er eydnan hjá einum gudsbarni. Hann ber okkum gjøgnum alt tað tunga, ið hesin heimur mangan hevur at bjóða og inn í teir ævigu bústaðir.

Jóannis Fonsdal, prestur

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 19. apríl
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl
Enn eru nøkur pláss eftir til Norrtúrin 2.-10. aug. saman við sandoyingum. Tilmeld. 316491
Týsdagur 20. apríl
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásøgn, Jákup Lindenskov
Mikudagur 21. apríl
kl. 10-12 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson.
kl. 15 Vitja framsýningina í Lítluvík
Hósdagur 22. apríl
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14 Fundur fyri pensioneraðum sjúkrasystrum
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagur 23. apríl
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14-17 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson
Hósdagur 22. apríl
Prát og sangur
Fríggjadagur 23. apríl
Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, sonuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Leygardagin 17. apríl verður gongutúrur: Av Tenruyggi eftir gøtuni inn á Sund. Lættur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 15.00. Havið heit og góð gongukløðir og drekkamunn við. Tilmelding.

Frá Eysturoyar Gongufelag
Spákingartúrur verður á Strondum sunnudagin 18. Vit møtast á Hulki kl. 14, Hilmar Kass er frásøgumaður. Tilmelding ikki neyðug.

Eldrafelagið Nón, Saltangará
Veitslan í Bygdarhúsinum í Leirvík verður 17. apríl kl. 17.30. Bussur fer frá Runavíkar Sjómansheimi kl. 17.00.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin19. apríl
Vit seyma teppuni liðug. Upplestur.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensiónistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 19. apríl
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 20. apríl
Ítriv fyri áhugað
Mikudagin 21. apríl
Hugnaløta v/ Mejnhardt og Judith

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

ACA
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Bláí Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Bláí Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið
felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo
og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

KONFIRMATIÓN

Í Vejleå-kirke Ishøj, sunnudagin 18. apríl verður Stefan Ísafjørð Joensen, sonur Jógvan M. Joensen og Poulinu Einarsson, Tvøroyri, konfirmeraður. Adr.: Grandlunden 89, 2635 Ishøj.

Sunnudagin 18. apríl konfirmerast Kenneth Gaardlykke Jensen, sonur Heidi Gaardlykke og Poul Jensen í Galten kirkju. Adr.: Heidi Gaardlykke, Nattegalevej 6E, 8464 Galten.

80 ÁR

Mánadagin 19. apríl fyllir Maria Berg Jacobsen, Søldarfirði 80 ár. Dagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði sunnudagin 18. apríl kl. 17.00.

BRÚDLEYP

Leygardagin 24. apríl kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hallfríð Hammer, Toftir og Rúni í Hjøllum, Saltnes. Kl. 18.00 verður borðhald fyri innbodnum á Sjómansheiminum í Runavík. Eftir kl. 21 er opið hús hjá Klement Hammer, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 24. apríl kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Hansi í Kálvalíð, Tórshavn og Súni Jacobsen, Haldórsvík. Kl. 18.00 verður borðhald fyri innbodnum í Starvsmannafelagshúsinum, J. H. Schrøtersgøta 9. Eftir kl. 21 er opið hús, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 22. mai kl. 13.00 giftast í Ebenezer Synnøve Hatlehol av Vatne, Noreg og Dánjal av Rana, Tórshavn. Brúðarveitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at boða frá á tlf. 312850 ella maibryllup@hotmail.com áðrenn 5. mai.

Leygardagin 22. mai kl. 17.00 giftast á Sýsluskrivstovuni á Tvøroyri Torgerð í Lágabø, Vágur og Páll Lervig, Leirvík. Veitslan verður í VB-húsinum í Vági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443023 ella 254931 innan 8. mai.

Leygardagin 22. mai kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju Joan Jacobsen, Hvalba og Christian Müller, Vágur. Veitslan verður í Roynhúsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 8. mai á tlf. 375550, 375142 ella 373417.

Leygardagin tann 19. juni kl. 15.00 giftast á býráðsskrivstovuni í Vági Malan Klakkstein og Alex Vilhelm. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 374004, 269537 og 573006 innan 28. mai.

Leygardagin hin 10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Havn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík. Tey, ið vilja gleða okkum at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 25. juni á tlf. 320391 ella 255263 eftir kl. 19.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 17.04. kl. 21[15]
Leygardagin 17.04. kl. 23[30]
Sunnudagin 18.04. kl. 22[15]



Leygardagin 17.04. kl. 19[00]
Leygardagin 17.04. kl. 23[00]
Sunnudagin 18.04. kl. 20[00]
Sunnudagin 18.04. kl. 22[00]



Leygardagin 17.04. kl. 20[30]
Sunnudagin 18.04. kl. 19[30]



Leygardagin 17.04. kl. 16[30]
Sunnudagin 18.04. kl. 17[30]

Leygardagin 17.04. kl. 16[15]
Leygardagin 17.04. kl. 18[30]
Sunnudagin 18.04. kl. 17[15]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu